Danbjørg skrivar

Støða tjóðveldisflokksins í løtuni

Við hesari yvirskrift er grein í »14. september« miðvikudagin 31. mars í ár.

Tá ið fólk sóu hasa yvirskrift, hugsaðu flest øll, at nú fór »14. september« at syngja sálmin: »Far verden farvel!« — sum Ólavur Michelsen kanska nýliga hevur týtt til føroyskt. — Okkurt tilíkt rann sjálvandi fólki í huga, tí øll vita, at støða tjóðveldisflokksins er hin sama sum sjúklingsins, tá ið deyðin við liggjanum stendur framman fyri seingini.

Óðrvísi var, tá ið nusitandi landsstýrið varð stovnað. Fyrst kom harra Erlendur Patursson fram við eini loysingarroðu í Útvarpinum. Har aftaná hoyrdu vit háttvirda løgmannin Hákun Djurhuus, ið kanska ikki nýtti somu orðini, sum Erlendur, men innihaldið var ógviliga meinlikt. Væl nevndi hann ikki orðið loysing ella tilíkt. Men einki var at taka feil av tí, at har var semja og vinarlag millum hesar báðar menn og teir flokkar og helst millum teir flokkar og menn, sum myndaðu tað núsitandi landsstýrið. Roður teirra Erlends og Hákunnar vóru sum talaðar av somu tungu og lýstu landsstýrisins vegna reinan loysingarpolitikk. Har var einki at misskilja. Har var loysingin í stevnu teirra serliga í tí støðu, teir tá tóku til.

1) borgarrættindini
2) uttanríkistænastuna og
3) fólkatingssessirnar.

Viðvíkjandi borgarrættindunum segði Erlendur, at bara hann, sum eigur føroysk foreldur, skal eiga borgarrætt í Føroyum. — Hetta mátti so føra tað við sær, at vit føroyingar komu at missa borgarrættin í Danmark og í Grønlandi. Hákun Djurhuus málber seg eitt sindur óðrvísi og segði, at borgarrætturin skal skipast eftir nationalprincippinum. Orðið nationalitetsprincippið nýtti hann fyri at balla meiningina eitt pinkulítið sindur inn.

Henda innballingin var so byrjanin til fólkaflokksins aking aftur eftir hæli saman við gamla sjálvstýrinum, sum er túsundkunstnari, tá ið umræður at aka undan og sleppa sær burtur frá ábyrgdini.

So við og við kom tað so til tess, at tjóðveldið fór at briksla fólkaflokkinum og gamla sjálvstýrinum, at hesir báðir flokkar brutu samgongusáttmálan.

Klandrið í Tinganesi harðnaði so við og við inntil figgjarlógin kom fram. Ja, tá ið figgjarlógin varð framløgd, segði Erl. P., at hann og Karstin Hoydal ongan bókstav og onki tal áttu í hasari figgjarlógini. Teir høvdu eina aðra, sum seinri skuldi koma fram.

Men hvar er tjóðveldisins figgjarlóg? Hon kom aldri fyri dagsins ljós.

Ein má tí spyrja: toldi henda figgjarlóg ikki dagsins ljós?

Kanska toldi hon dagsins ljós; men so var orsøkin ein heilt onnur nevniliga tann, at tjóðveldið gav eftir fyri hóttan løgmansins um at útskriva val. Ræðsla kom á tjóðveldið, sum ræðist valg Men so fara vit at taka »14. september« fram aftur og hyggja at greinini, sum hari stendur við yvirskriftini: Støða tjóðveldisflokksins í løtunie. Har standa m. a. hesi orð: »Hyggja vit um farnan veg og at viðurskiftunum í løtuni, so liggur tað opið fyri, at onga tíð hevur tjóðveldispolitikkurin átt sterkari støðu enn beint nú í løtunie. Ein má spyrja seg sjálvan: kann eitt politiskt blað gera slíkt grin, háð og spott við sínum egna politiska flokki uttan samstundis at drepa flokkin fullkomuliga ? ?

Men hetta er ikki tað einasta háð og spott í »14. september« hevur sett fram móti tjóðveldisflokkinum, tí fyri stuttum skrivaði blaðið, at landsstýrið fekk álitisváttan tingsins við tað, at figgjarlógin varð viðtikin. Ein figgjarlóg, sum tjóðveldisflokkurin hvørki átti tal ella bókstav í. Hvør hevur hoyrt ella lisið makan til slíkt? — Tá ið figgjarlógin varð framløgd, segði Erl. P., at tjóðveldið átti hvørki tal ella stav í henni... . — Men tá ið henda sama lóg kom til atkvøðu, stóð hesin sami maður og takkaði — ja, við tárum í eygunum takkaði hann fyri hesa somu figgjarlóg, sum avvísti øll krøv tjóðveldismanna, og »14. september« breggjar av álitisváttan til landsstýrið fyri hesa somu lóg, sum tjóðveldið ongan part eigur í.

Og so omaná tað heila skrivar »14. september«, at tjóðveldispolitikkurin ongatíð áður hevur átt so sterka støðu sum júst nú í dag.

Eg má siga, at grikskt og japanesiskt havi eg aldri skilt, men hvaðna minni kann eg skilja alt hetta, sum »14. september« førir fram.

Kann nakar skilja, hvat tað er, sum »14. september« hugsar um, tá har er skrivað, at tjóðveldisstøðan kann vera sterk aftaná at hava tapt í hvørjari einastu syftu, — ikki eitt einasta tjóðveldismál er framt á tingi hvørki nú í ár ella nakrantíð, síðan núsitandi landsstýrið var sett á stovn? — Ófatuligt tað heila sum er.

— — —

Men aftaná at frammanfyri standandi var skrivað, kom blaðið »Tingakrossur« mær í hendi, og har melur grovt, og har verður beinleiðis sagt, at tað er sjálvur tjóðveldisflokkurin, sum hevur alla skuldina fyri at eingi sjálvstýris- ella loysingarmál eru framd, síðan núverandi landsstýrið varð sett á stovn. Jú so sanniliga melur alt so grovt nú, at har má okkurt fara at henda, tí slík samgonga kann ómøguligt samarbeiða ein einasta dag longri enn til dagin í dag. Nú má Føroya fólk krevja, at har kemur eitt annað skil, sum sømir seg fyri eina mentaða tjóð, tí nú eru vit smokkað so langt niður, at sjálvt halanegarar standa nógv hægri mentunarliga enn Føroya landsstýri. Her má ein endi koma á, og tað má ske beinanvegin nú.

J. H. Danbjørg.

9 SOVJET-KOSMONAUTAR UMKOMNIR Í RÚMDINI

Í minsta lagi 9 sovjettiskir kosmonautar eru umkomnir í rúmdini síðan 1960, sigur ein radioamatørur í Torino í Italiu. Saman við bróður sínum Judica-Cordigli hevur hann eina amatørstøð at lurta eftir radioljóðum frá rúmdini, og síðan 1960 hava teir hoyrt 9 sovjettiskar kosmonautar hvørva

Judico-Cordigla kommenteraði tíðindini í einum italskum dagblaði, sum segði seg vita um 14 sovjettiskar rúmdarmenn, sum horvnir vóru í rúmdini. Blaðið segði frá, at hann og bróðurin visti um 9 rúmdarmenn, sum farnir vóru, meðan teir í USA vita um 5 aðrar, ið eru farnir á sama hátt.

Blaðið segði nøvnini á teimum 5 horvnu kosmonautunum. Í mai 1964 doyðu Sciboting og Dolgov saman við einari ókendari kvinnu. Í november 1962 doyði Belokonev mánaðin frammanundan Lodovski og árið fyri Sovodovski.

Blaðið sigur, at kosmonauturin Belokonov varð skotin út 8. november 1962 og ferðaðist kring jørðina til 12. november, meðan hann sendi tíðindi um ókendar rúmdarlutir eins og amerikumaðurin John Glenn gjørdi.

Blaðið endurtekur síðstu samrøðuna, sum Belokonev hevði við jørðina:

* »Rúmdarskipið er komið út av
* javnvág... eg hoyri tykkum
* ikki, eg kann ikki hoyra tykk-
* um. Soleiðis, nú ber til...
* battariini, ja, tey duga ikki
* meira ... tað er myrkt her
* inni ... ná lat okkum royna ...«
* 44—46—456—88... kammerat-
* ar... for helviti... eg kann
* hvat?... for helviti... eg kann
* ikki ... tað er ógjørligt ... eg
* eg kann ikki, sigi eg ... skiljið
* meg, skilji meg...«

Ósemja millum samgongduna um bókasavnið

— LANDSSTÝRIÐ ER FORNERMAÐ SIGUR LØGMAÐUR

Landsbókasavnið verður ikki samtykt at byggja fyrrenn detailprosjektið er gjørt — til tess samtykti tingið at avseta 200.000 krónur

Tingmenn gjørdu stórt tjak burturúr málinum at byggja landsbókasavn á Müllers trøð. Tað komst fyri ein part av, at tað var á hesum lendi kirkjuráðið í Havn hevði ætlað at byggja nýggju kirkjuna, men hesum forðaði landsstýrið, sum keypti lendi undan kirkjuráðnum.

Menn vóru ikki samdir um hvussu bygningurin skuldi koma at vera. Tað fyriliggur eitt skitsuprosjekt, ið sýnir ein bygning, góðar 2000 m² í ummáls. Tað ætlast at verða ein heldur lágur bygningur úr betongi og glasi.

* Undir viðgerðini av málinum
* setti Kj. Mohr fram broyting-
* ingaruppskot, hareftir áleggj-
* ast skuldi landsstýrinum at
* gera ein byggiplán á Debesar-
* trøð og Müllerstrøð við tí í
* hyggju at fáa lendi til bygging
* av nýggjari kirkju.

Meðan uppskotið um at lata lendi til nýggja kirkju var avvíst av tinginum við at bert 10 tingmenn góðu atkvøðu fyri, vóru hesa ferð bert 5, sum vóru fyri uppskotinum.

Tá løgtingsmaðurin Niels Holm Jacobsen, (fólkafl.) spurdi um samtyktin at lata landsstýrið stíla fyri detailprosjektering av landsbókasavni- og skjalasavni var at skilja soleiðis, at málið aftur skuldi leggjast fyri tingið, ella um landsstýrið uttan at leggja málið aftur fyri tingið, kundi lata byggingina fara fram, reistist løgmaður úr sæti, og segði vegna landsstýrismenninar, at teir tóku tað sum eitt fornermilsi, at spurningurin var settur fram.

Hesum svaraði Niels Holm Jacobsen aftur — hann beklagaði, at landsstýrið ikki toldi at tingmenn loyvdu sær at seta spurningar fram í tinginum.

ÚTBJÓÐING

Vegna Sjóvar sóknar kommunu, Strendur, verður útboðið í almennari licitatión jørð-, kloakk-, betong- og jarnbetongarbeiðið viðvíkjandi byggjan av nýggjum skúla á Strondum. Tekningar og frágreiðingar fáast til láns móti kr. 200 í veðhaldi frá skrivstovu okkara frá mánadegi, t. 5. í h.

Skrivlig boð í afturlatnum bræ vbjálva, merkt »Strandaskúli«, verða send okkum í seinasta lagi leygardagin 1. mai kl. 12. 00. Tá verða tey innkomnu boðini opnað, meðan teir, ið boðið hava, eru hjástaddir.

Tórshavn, hin 2. apríl 1965.

LAMHAUGE & WAAGSTEIN,
projekterings- og byggifelag,
Tinghúsvegur 13, tlf. 1290.

IRIS

Heitur matur — Smurt breyð

TØKK

Mína hjartans tøkk skulu tit øll hava, sum mintust til mín 90 ára dagin.

Tit gleddu meg nógv.

Gud gleði tykkum.

Sissal Hentze,
Skúvoy

Besta gávan til FØROYINGIN burturi og heima er ein FØROYSK BÓK

FØROYA SPARIKASSI

Stovnaður 1832

Av innsettum peningi verður renta latin á henda hátt:

3 mánaða uppsøgn	4½ % p.a.
Uttan uppsøgn	4 % p.a.
Kekk-konto	2 % p.a.

Fyri størri peningahæddir við longri uppsagnartíð verður renta latin eftir seravtalu.

Opin hvønn dag kl. 10—12 og 14—16
Leygardag kl. 9½—12½
Telefon 1400

Deild:
NORÐSTREYMOYAR SPARIKASSI
VESTMANNA — Telefon 93

Opin mánadag kl. 4-6, týsdag, mikudag og hósdag 10-12 og 2-4, friggjadag kl.4-6 og leygardag kl. 10-12.

Vøggugávur

Hvørt nýføtt barn í Føroyum fær frá sparikassanum í føðingargávu eina

SPARIKASSABÓK UPPÁ 10 KR.

Henda vøggugáva verður eftir ynski foreldranna insett í:

FØROYA SPARIKASSA
NORÐOYA SPARIKASSA ella
SUÐUROYAR SPARIKASSA

Skúlasparing við sparimerkjum

— SPARIÐ Í SPARIKASSUNUM —